Ítróttasamband Føroya juni 2015

# ÍÐKANDI OG ÍTRÓTTAANLEGG Í FØROYUM

| | |
|---|---|
| Íðkandi: | 15.633 |
| Fótbóltsvøllir: | 22 |
| Sparkivøllir: | 107 |
| Ítróttarhallir: | 16 |
| Fimleikahallir: | 4 |
| Skúlahallir: | 37 |
| Svimjihyljar: | 19 |
| Rennibreytir: | 2 |
| Ríðibreytir | 4 |
| Skjótibreytir | 3 |
| Tennisvøllir | 3 |
| Bogaskjótibreytir | 0 |
| Judohøll | 0 |
| Borðtennishøll | 0 |
| Golfvøllur altj. | 0 |

# Inngangur

Føroysk ítróttafólk hava í mong ár stríðst ótroyttiliga í nógvum ymsum ítróttagreinum, og mangan hava tey staðið seg væl bæði heima og úti. Men langt frá altíð gjørdu umstøðurnar, at tey skaraðu framúr. Sigast kann tvørturímóti, at tey stóðu seg óvanliga væl, hóast umstøðurnar ikki vóru nøktandi.

Hesa frágreiðing hevur ÍSF latið gera fyri neyvari at kunna vísa á tørvin viðvíkjandi ítróttanleggum í Føroyum samanborið við fólkatal og tal á íðkandi í ymsu ítróttagreinunum. Talan er um fólkatalið, sum var 1. januar 2015. Talið á íðkandi er frá 1. mai 2015.

Funnið er fram til talið á íðkandi umvegis umsitingina hjá ÍSF, sum bæði hevur tøl í skrásetingarskipanini ASKI og neyvari kunnleika um, hvørji íðkandi eiga at verða skrásett har aftrat. Tølini í frágreiðingini eru tí tey nágreiniligastu, sum finnast kunnu.

Komið er fram til talið á ítróttaanleggum ymsar vegir. Tá talan er um sparkivøllir, eru upplýsingar fingnar til vega bæði hjá Tórshavnar kommunu, Fótbóltssambandi Føroya og einstaklingum kring landið, sum hava góðan kunnleika um síni økir.

Nakrar upplýsingar, m.a. um svimjihyljarnar, eru úr bókini "Føroyar framá – ÍSF 75 ár." Eisini eru upplýsingarnar um byggiár hjá ítróttarhallum úr hesi bókini eins og aðrar upplýsingar um gongdina í hallar- og vallarmálum kring landið.

Frágreiðingin gevur vónandi eina mynd av, hvussu umstøðurnar hjá ymsu ítróttagreinunum í Føroyum eru, bæði hvat støðd og anleggum viðvíkur. Strembað er eftir at gera lýsingina so neyva sum gjørligt, og skuldi onkur villa verið í, broytir hon neyvan heildarmyndina.

ÍSF hevði í mong ár ongi fullfíggjað hagtøl at halda seg til, tá tosað varð við myndugleikar um játtanir og umstøður í sambandi við ítrótt. Mett varð leingi, at um 15.000 íðkandi vóru í landinum. Neyvu tølini vísa, at so er. Tey vóru 15.633 1. mai 2015.

Eins og frágreiðingin vísir, eru umstøðurnar langt frá nøktandi í øllum ítróttagreinum og á øllum plássum. Frágreiðingin verður vónandi eitt haldgott grundarlag undir áhaldandi orðaskiftinum um, hvussu umstøðurnar hjá ítróttinum kunnu mennast næstu árini.

ÍSF ætlar at fylgja neyvt við hesum viðurskiftunum í framtíðini, og tá tørvur verður á tí, verður frágreiðingin dagførd. Talan verður sostatt um eitt livandi skjal, sum allatíðina skal vera til taks hjá ÍSF sjálvum, einstøku sersambondunum, feløgum, myndugleikum og øðrum, sum hava áhuga fyri ítróttaligu umstøðunum í Føroyum.

*Petur Elias Petersen, ÍSF-forseti*
*20. mai 2015*

# Íðkandi og ítróttaanlegg í Føroyum

Í Føroyum búðu 1. januar 2015 48.704 fólk, og sambært skrásetingini hjá ÍSF vóru 15.633 íðkandi í føroysku ítróttafeløgunum 1. mai 2015. Hetta vóru íðkandi, sum vóru skipað sum virknir limir í feløgunum. Talan kann tí vera um, at ein og sami persónur í fleiri førum taldi fyri fleiri íðkandi, tí ofta íðka fólk fleiri ítróttagreinir, t.d. fótbólt, hondbólt og fimleik.

Har fólk íðka, skapast tørvur á anleggum og hóskandi umstøðum annars, og tí skapar tann, sum íðkar t.d. tríggjar ítróttagreinir, tørv á hóskandi umstøðum í øllum trimum ítróttagreinum. Rætta talið á íðkandi at samanbera við tal á anleggum og aðrar hentleikar er tí samlaða talið á íðkandi. So mong íðkaðu ymsu ítróttagreinirnar í Føroyum 1. mai 2015:

| **Ítróttagrein** | **Íðkandi** |
|---|---|
| Fótbóltur | 4.733 |
| Fimleikur | 3.617 |
| Hondbóltur | 2.068 |
| Frælsur ítróttur | 1.117 |
| Flogbóltur | 960 |
| Svimjing | 816 |
| Kappróður | 597 |
| Badminton | 480 |
| Ríðing | 465 |
| Seyðahundalimir | 114 |
| Skjóting | 104 |
| Súkkling/triathlon | 93 |
| Bogaskjóting | 84 |
| Golf | 82 |
| Borðtennis | 68 |
| Judo | 66 |
| Tennis | 60 |
| Froskmenn | 45 |
| Billiard | 39 |
| Kurvabóltur | 25 |
| **Tilsamans** | **15.633** |

## Tal á íðkandi í kommunum í ymsum ítróttagreinum

| Ítróttagrein | Íðkandi tils. | Tórshavnar | Klaksvíkar | Runavíkar | Eystur |
|---|---|---|---|---|---|
| **Fólkatal** | **48.704** | **20.235** | **4.893** | **3.793** | **2.001** |
| Fótbóltur | 4733 | 1537 | 496 | 555 | 275 |
| Fimleikur | 3617 | 2580 | 265 | 624 | |
| Hondbóltur | 2068 | 1007 | 210 | 80 | |
| Frælsur ítróttur | 1117 | 590 | 300 | 89 | |
| Flogbóltur | 960 | 180 | 130 | | |
| Svimjing | 816 | 300 | 90 | | 60 |
| Rógving | 597 | 370 | 50 | 100 | |
| Badminton | 480 | 200 | 130 | | |
| Ríðing | 465 | 339 | | | |
| Seyðahundar | 114 | 114 | | | |
| Skjóting | 104 | 60 | | | |
| Súkkling | 93 | 93 | | | |
| Bogaskjóting | 84 | 36 | | 28 | |
| Golf | 82 | 82 | | | |
| Borðtennis | 68 | 30 | | | |
| Judo | 66 | 26 | | | |
| Tennis | 60 | 60 | | | |
| Froskmenn | 45 | 45 | | | |
| Biljard | 39 | | 30 | | |
| Kurvabóltur | 25 | 25 | | | |

| | Nes | Sandoy | Vestmanna | Sørvágs | Sjóvar |
|---|---|---|---|---|---|
| **Fólkatal** | **1.236** | **1.232** | **1.214** | **1.090** | **938** |
| Fótbóltur | 266 | 131 | | | |
| Fimleikur | | | | | |
| Hondbóltur | | 30 | 200 | | 219 |
| Frælsur ítróttur | | | | | |
| Flogbóltur | 60 | 44 | | 200 | |
| Svimjing | 130 | | | | |
| Rógving | | | 30 | | |
| Badminton | | | 40 | | |
| Ríðing | | | | | |
| Seyðahundar | | | | | |
| Skjóting | | 10 | 34 | | |
| Súkkling | | | | | |
| Bogaskjóting | | | | | |
| Golf | | | | | |
| Borðtennis | | | | | |
| Judo | | | | | 15 |
| Tennis | | | | | |
| Froskmenn | | | | | |
| Biljard | | | | | |
| Kurvabóltur | | | | | |

| Vága | Tvøroyrar | Sunda | Fuglafj. | Vágs |
|---|---|---|---|---|
| **1.991** | **1.730** | **1.646** | **1.521** | **1.332** |
| 499 | 195 | 331 | 219 | 179 |
| | | | 148 | |
| 160 | | | | 102 |
| 59 | 79 | | | |
| 96 | 120 | | 130 | |
| | | | 94 | 142 |
| 59 | | 25 | | 9 |
| 70 | | | 40 | |
| 126 | | | | |
| | | | | |
| 20 | | 16 | | |
| | | | | |
| 20 | | | | |
| | | | | |
| | 28 | | | |
| | | 25 | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | 9 | | | |
| | | | | |

| Hvalbiar | Eiðis | Kvívíkar |
|---|---|---|
| **725** | **687** | **570** |
| 50 | | |
| | | |
| | 60 | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | 8 |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |

# Fótbóltur

Størsta ítróttagreinin í Føroyum er fótbóltur. 4.733 limir eru skrásettir í fótbóltsfeløgunum, og 22 fótbóltsvøllir í fullari støðd eru kring landið. Allir eru graslíkisvøllir uttan tann í Hvalba, sum er grasvøllur. Haraftrat eru 107 sparkivøllir kring oyggjarnar, harav 55 eru í Tórshavnar kommunu. Um 40 av hesum 107 sparkivøllunum eru UEFA-vøllir, sum komu í lag í 2004, tá UEFA fylti 50 ár og læt pening til sparkivøllir í Føroyum og aðrastaðni. Hinir vøllirnir eru sparkivøllir, sum kommunur sjálvar hava tikið stig til við m.a. skúlar, spælipláss og barnagarðar. Á heilt smáum plássum sum t.d. í Dali og Rituvík eru sparkivøllir.

**Fótbóltsvøllir í Føroyum**

| | |
|---|---|
| 1 | Tórsvøllur. Tórshavn |
| 2 | Ovari vøllur, Tórshavn |
| 3 | Niðari vøllur, Tórshavn |
| 4 | Vøllurin Inni í Vika, Argir |
| 5 | Vøllurin við Djúpumýri, Klaksvík |
| 6 | Vøllurin í Fløtugerði, Fuglafjørður |
| 7 | Vøllurin í Sarpugerði, Norðragøta |
| 8 | Vøllurin í Brekkuni, Leirvík |
| 9 | Vøllurin við Løkin, Runavík |
| 10 | Svangaskarð 1, Toftir |
| 11 | Svangaskarð 2, Toftir |
| 12 | Vøllurin á Skála |
| 13 | Vøllurin við Margáir, Streymnes |
| 14 | Vøllurin á Mølini, Eiði |
| 15 | Vøllurin á Valloyruni, Sandavágur |
| 16 | Vøllurin á Pálsoyruni, Sørvágur |
| 17 | Vøllurin á Sandinum,. Miðvágur |
| 18 | Vøllurin Inni í Dal, Sandur |
| 19 | Vøllurin við Stórá, Trongisvágur |
| 20 | Vøllurin á Eiðinum, Vágur |
| 21 | Vøllurin á Krossinum, Sumba |
| 22 | Vøllurin í Hvalba |

Við 22 vøllum til 48.704 fólk eru í meðal 2.213 fólk til hvønn vøllin, men hetta talið sigur ikki nógv, tí ymiskt er, hvussu fólkarík ymsu økini eru.

Verður bara hugt at Tórshavnar kommunu, eru fýra vøllir, tríggir í Havn og ein á Argjum, til 20.235 fólk. Tað svarar til 5.058 fólk til hvønn vøllin.

Í Klaksvík eru 4.893 fólk til vøllin við Djúpumýri, og í Runavíkar kommunu eru 3.793 fólk um vøllin við Løkin og vøllin á Skála.

Eysturkommuna hevur tveir vøllir, tann í Gøtu og tann í Leirvík, til 2.001 fólk.

Í Vága kommunu eru 1.991 fólk um vøllirnar í Sandavági og Miðvági, og í Sørvági eru 1.090 fólk um vøllin har. Tilsamans eru 3.081 um vøllirnar í Sandavági, Miðvági og Sørvági.

Á Tvøroyri eru 1.730 fólk um vøllin við Stórá, og í Sunda og Eiðis kommunum eru tveir vøllir, tann við Margáir og tann á Mølini, til tilsamans 2.333 fólk. Nýggjur vøllur er í gerð á Eiði.

Í Fuglafirði eru 1.521 fólk til vøllin har, og í Vági eru 1.332 fólk um vøllin á Eiðinum. Í Nes kommunu eru 1.236 fólk til tveir vøllir á Svangaskarði.

Á Sandoynni eru 1.275 fólk um vøllin við Meginskúlan. Í Hvalba eru 725 fólk um grasvøllin og í Sumbiar kommunu 354 fólk um vøllin á Krossinum. Tó spæla sumbingar nú fótbólt við FC Suðuroy í Vági.

**Íðkandi í fótbólti býtt á kommunur og vøllir**

| Kommuna | Íðkandi | Vøllir | Íðkandi fyri hvønn vøll |
|---|---|---|---|
| Tórshavnar kommuna | 1.537 | 4 | 384 |
| Klaksvíkar kommuna | 496 | 1 | 496 |
| Runavíkar kommuna | 555 | 2 | 277 |
| Eysturkommuna | 275 | 2 | 137 |
| Vága og Sørvágs kommunur | 499 | 3 | 166 |
| Tvøroyrar kommuna | 195 | 1 | 195 |
| Sunda og Eiðis kommunur | 331 | 2 | 165 |
| Fuglafjarðar kommuna | 219 | 1 | 219 |
| Vágs kommuna | 179 | 1 | 179 |
| Nes kommuna | 266 | 2 | 133 |
| Sandoy | 131 | 1 | 131 |
| Hvalbiar kommuna | 50 | 1 | 50 |
| Sumbiar kommuna | 0 | 1 | 0 |
| **Tilsamans** | **4.733** | **22** | |

Havast skal í huga, at í Tórshavnar kommunu er AB einsamalt um vøllin á Argjum, og hini feløgini eru um tríggjar vøllir í Gundadali. Ferð er sett á at gera nýggjan fótbóltsvøll í Hoyvík. Eftir yvirlitinum er størsta trýstið á vøllin í Klaksvík. Næststørsta trýstið er í Tórshavnar kommunu.

**Sparkivøllir kring landið**

Aftrat vøllunum í fullari støðd koma sparkivøllirnir. Funnið er í sambandi við hesa frágreiðingina fram til 107 sparkvøllir, harav 55 eru í Tórshavnar kommunu. Sigast kann tí, at menningin, hvat umstøðunum í nærumhvørvinum viðvíkur, hevur verið stór í fótbólti.

Í yvirlitinum sæst, hvar sparkvøllirnir eru. Har til bar at fáa støðdina á einstaka vøllinum upplýsta, er hon nevnd. Í hinum førunum er bara navnið á plássinum, har sparkivøllurin er, nevnt:

**Tórshavnar kommuna**

1 Á Flat
2 Á Teigi
3 Argja Skúli
4 Argjahamar
5 Bjarnoyarvegur
6 Blákollagøta
7 Bókbindaragøta
8 Bóndabrekka
9 Býlingshús undir Fjalli
10 Dalakrókur
11 Eystan gil
12 Eysturskúlin
13 Eysturvøllur
14 Fagralíð
15 Hákunargøta
16 Heiðavegur
17 Hestur
18 Heygskrókur
19 Hoyvíkar skúli
20 Hvítanes
21 Í Svanga
22 Inni á Gøtu
23 Kaldbak
24 Kirkjubøur
25 Kommunuskúlin
26 Konmansmýra
27 Krossgøta
28 Líðin, Kollafjørður
29 Lützenstrøð
30 Løgmannabreyt skúli
31 Marinargøta
32 Millum Gilja
33 Müllers trøð, Argir
34 Niðara Ternuryggur
35 Nólsoy, Mýran
36 Nólsoyar skúli
37 Norðasta Horn
38 Oman Hoydalar
39 Ovari Ternuryggur
40 Purkugerði
41 Reynstún
42 Skt. Frans
43 Signabøur
44 Undir Brúnni 1
45 Undir Brúnni 2
46 Undir Gráasteini
47 Vallalíð
48 Velbastaðar Skúli
49 Velbastaður
50 Venjingaskúlin
51 Ytri Skúli
52 Øksnagerði
53 UEFA, Folagerði, 13×21m
54 UEFA, Maritugøta, 13×21m

**Norðoyggjar**

55 UEFA, Norðoyri, 13×21m
56 UEFA, Undir Grashjalla, Klaksvík, 13×21m
57 UEFA, Tekniski skúli, Klaksvík, 13×21m
58 Gamli Tekniski skúli, Klaksvík
59 Jørundsgøta, Klaksvík
60 Mylnugøta, Klaksvík
61 Hamarssnið, Klaksvík
62 UEFA, Húsar, 13×21m
63 UEFA, Viðareiði, 16×30m
64 UEFA, Mikladalur, 23×43m
65 UEFA, Svínoy, 13×21m

**Vágar**

66 UEFA, Sandavágur, 13×21m
67 UEFA, Bø, 25×14m
68 UEFA, Miðvágur, 13×21m
69 UEFA, Sørvágur, 13×21m
70 UEFA, Vatnsoyrar, 13×21m
71 Vøllur á Zarepta

**Eysturoy**

72 UEFA, Saltnes, 22×13 m
73 UEFA, Søldarfjørður, 13×21 m
74 UEFA, Leirvík, 13×21 m
75 UEFA, Innan Glyvur, 13×21 m
76 UEFA, Eiði, 29×19m
77 UEFA, Lamba, 13×21m
78 UEFA, Kambsdalur, 27×17m
79 UEFA, Gøta, 13×21m
80 UEFA, Oyndarfjørður, 13×21m
81 UEFA, Funnigsfjørður, 13×21m
82 UEFA, Hellur, 13×21m
83 UEFA, Strendur, 13×21m
84 UEFA, Nes, 13×26m
85 Æðuvík
86 Rituvík
87 Saltangará
88 Glyvrar
89 Skálafjørður

**Suðuroy**

90 UEFA, Trongisvágur, 13×21m
91 UEFA, Tvøroyri, 13×21m
92 UEFA, Fámjin, 17×26m
93 UEFA, Lopra, 13×21m
94 UEFA, Sandvík, 13×21m
95 Sumbiar skúli
96 Vágs skúli
97 Porkeris skúli
98 Hovs skúli

**Sandoy**

99 UEFA, Skúvoy, 13×21m
100 UEFA, Sandur, 13×21m
101 UEFA, Skopun, 13×21m
102 UEFA, Sandur, 13×21m
103 UEFA, Skálavík, 13×21m
104 Dalur

***A*ðrir**
105 UEFA, Haldórsvík, 13×21m
106 UEFA, Vestmanna, 13×21m
107 UEFA, Hósvík, 20×30m

Hugskotið við sparkivøllunum hjá UEFA er, at teir skulu vera smærri vøllir, har bólturin allatíðina er í spæli. At bólturin allatíðina er í spæli, hevur við sær nógvar bóltnertingar og málmøguleikar, skrivaði FSF m.a. um vøllirnar í lýsing av sparkivallarætlanini í 2004.

# Fimleikur

Við sínum 3.617 limum er fimleikur næststørsta ítróttagreinin í landinum. Av hesum limunum eru 2.580 í Tórshavnar kommunu, í Runavíkar kommunu eru 624 limir, í Klaksvíkar kommunu 265 limir og í Fuglafjarðar kommunu 148. Greitt er tí, at fimleikurin er ikki so útbreiddur, sum hann kann tykjast, um bara verður hugt at samlaða talinum.

Fyrsta høllin, sum burturav varð bygd til fimleik, var fimleikahøllin á Stórheyggi í Havn. Hon kom í 1974. Havnar Fimleikafelag bygdi hana, men seinni yvirtók kommunan hana. Til amboðsfimleik var høllin ongantíð nóg long, og tí varð amboðsfimleikur viðhvørt vandur í virkisbygningum. So hevur eisini verið í Runavíkar kommunu.

Í 2005 beyð Tórshavnar kommuna feløgunum á fund um at byggja eina nýggja høll til amboðsfimleik og estetiskan fimleik. Í 2008 varð samtykt at fara undir byggingina, og í 2010 stóð fimleikahøllin Fimi klár at taka í nýtslu við Tórsvøll í Gundadali. Í 2011 samtykti Runavíkar kommuna, at nýggj fimleikahøll skuldi byggjast við ítróttarhøllina, og 2014 var fimleikahøllin Bylgjan liðug.

Hesar báðar hallirnar eru tær einastu, sum bjóða íðkarunum nútímans umstøður til øll sløg av fimleiki.

Aftrat hesum báðum hallunum og tvíhøllini á Stórheyggi koma 37 fimleikahallir í ymsu skúlunum. Tær eru ikki bygdar til fimleikafeløgini, men skúlaungdóm, og hava altíð verið ein fongur, hvat uppaling innan íðkan og rørslu viðvíkur.

Tær flestu skúlahallirnar hava standardstøddina 21×11 m, men summar í smærri skúlum eru minni. Vant hevur annars eisini verið í øðrum bygningum. Sum dømi kann nevnast Mentanarhúsið í Fuglafirði.

**Fimleikahallir og skúlahallir**

1. Fimi í Havn
2. Bylgjan í Runavík
3. Á Stórheyggi 1
4. Á Stórheyggi 2
5. Argja skúli
6. Venjingarskúlin
7. Tórshavnar Kommunuskúli
8. Eysturskúlin 1
9. Eysturskúlin 2
10. Sankta Frans skúli
11. Hoyvíkar skúli
12. Føroya Fólkaháskúli
13. Føroya Studentaskúli
14. Kollafjarðar skúli
15. Nólsoyar skúli
16. Skúlin á Argjahamri
17. Skúlin á Løgmannabreyt 1
18. Skúlin á Løgmannabreyt 2
19. Ziskatrøð 1
20. Ziskatrøð 2
21. Fossánes
22. Viðareiði
23. Tofta skúli
24. Skúlin í Rituvík
25. Glyvra skúli
26. Søldafjarðar skúli
27. Stranda skúli
28. Leirvíkar skúli
29. Fuglafjarðar skúli
30. Gøtu skúli, Gøtugjógv
31. Felagsskúlin á Oyrarbakka
32. Oyndarfjarðar skúli
33. Skúlin í Vestmanna
34. Vágs skúli
35. Porkeris skúli
36. Tvøroyrar skúli
37. Hvalbiar skúli
38. Roynhøllin
39. Kvívíkar skúli
40. Skúlin á Giljanesi
41. Sørvágs skúli

# Hondbóltur

Triðstørsta ítróttagreinin er hondbólturin við 2.068 skrásettum limum. Leingi vóru bara tvær ítróttahallir í Føroyum, KÍ-høllin í Klaksvík frá 1969 og høllin á Hálsi frá 1970, men í sambandi við og eftir CHM-kappingina í Føroyum í 1980 komu fleiri nýggjar hallir, og seinni eru uppaftur fleiri bygdar. Nú eru 16 hallir kring landið, um Badmintonhøllin í Havn verður tald við.

Ítróttahallirnar hava alstóran týdning fyri nærumhvørvini, tí tær hýsa serliga vetrarhálvuna einum stórum hópi av ungdómi og íðkandi annars. Á plássunum eru tær miðdepilin, har ítróttafólkini á staðnum kappast við íðkandi av øðrum plássum, og har bygdar- ella býarfólkið møtir upp at stuðla sínum liðum.

**Hallir í Føroyum**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. KÍ-høllin | 1969 | 9. Gundadalshøllin | 1984 |
| 2. Høllin á Hálsi | 1970 | 10. Høllin í Runavík | 1984 |
| 3. Høllin í Vági | 1980 | 11. Høllin í Vestmanna | 1986 |
| 4. Høllin á Skála | 1981 | 12. Hoyvíkshøllin | 2002 |
| 5. Høllin á Kambsdali | 1982 | 13. Høllin á Eiði | 2003 |
| 6. Høllin í Trongisvági | 1982 | 14. Høllin í Kollafirði | 2007 |
| 7. Badmintonhøllin í Havn | 1983 | 15. Badmintonhøllin í Klaksvík | 2007 |
| 8. Høllin á Giljanesi | 1983 | 16. Høllin á Sandi | 2012 |

**Ítróttahallir samanborið við fólkatal**

Í Føroyum búðu 48.704 fólk 1. januar í 2015. Við 16 hallum vóru sostatt í meðal 3.044 fólk fyri hvørja høll, men hetta talið sigur ikki nógv, tí hallirnar eru í bygdum og býum, har meir og minni fólk býr. Viðvíkjandi hallartímum eru tey smáu plássini betri fyri enn tey stóru.

Í allari Tórshavnar kommunu búgva 20.235 fólk, og har eru fýra hallir til hondbólt og flogbólt, um Badmintonhøllin, sum bara verður brúkt til badminton, ikki verður tald við. Hesar hallirnar eru høllin á Hálsi, Gundadalshøllin, Hoyvíkshøllin og høllin í Kollafirði. Í Tórshavnar kommunu eru sostatt 5.058 fólk í meðal um hvørja høll. Hetta talið sigur tó heldur ikki allan sannleikan, tí verður Tórshavnar kommuna býtt upp í økir, gerst støðan øðrvísi.

Í sjálvum Tórshavnar býi búgva 12.640 fólk. Í Hoyvík búgva 3.800 fólk, og í Kollafirði, á Oyrareingjum og Signabø búgva tilsamans 925 fólk. Tvær hallir eru í Tórshavnar býi, høllin á Hálsi og Gundadalshøllin. Har eru sostatt 6.320 fólk um hvørja høll.

Í Hoyvík eru 3.800 fólk um Hoyvíkshøllina, og í Kollafirði, á Oyrarreingjum og Signabø eru 925 fólk um høllina í Kollafirði. Havast skal so í huga, at íðkandi úr Sundalagnum ofta íðka í

Kollafirði, so høllin har kemur eisini íðkandi í Hósvík, Hvalvík og Streymnesi til góðar.

Á Argjum búgva 1.994 fólk, og har er ein minni høll í skúlanum á Hamrinum. Argjafólk íðka eisini í hallunum í Tórshavnar býi.

Í Klaksvíkar kommunu búgva 4.893 fólk, og íbúgvarnir har hava KÍ-høllina og Badmintonhøllina at íðka í, sum báðar verða brúktar til m.a. hondbólt, flogbólt og badminton. Tilsamans eru 2.446 fólk um hvørja høll í Klaksvík.

Í Runavíkar kommunu eru tvær hallir, tann í Runavík og tann á Skála. Í Runavíkar kommunu búgva 3.793 fólk. Havast skal í huga, at hondbóltur er stór ítróttagrein á Strondum í Sjóvar kommunu, sum brúkar høllina á Skála. Í Sjóvar kommunu búgva 938 fólk. Fólkatalið tilsamans í Runavíkar kommunu og Sjóvar kommunu er 4.731. Í hesum báðum kommununum eru sostatt í meðal 2.365 fólk um hvørja høll.

Í Eysturkommunu búgva 2.001 fólk, men har er ongin høll. Í Fuglafjarðar kommunu, har 1.521 fólk búgva, er ein høll á Kambsdali. Samstarv er um hesa høllina millum Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu. Tilsamans samstarva 3.522 fólk í kommununum báðum um høllina á Kambsdali.

Í Vága kommunu, har stóru bygdirnar eru Sandavágur og Miðvágur, búgva 1.990 fólk. Tey samstarva um høllina Giljanesi. Sørvágs kommuna er ikki uppi í samstarvinum, og tey 1.091 fólkini í Sørvági hava tí onga høll. Í Tvøroyrar kommunu eru 1.730 fólk, og tey hava høllina í Trongisvági.

Í Sunda kommunu, har 1.646 fólk búgva, er ongin høll, men í Eiðis kommunu við 687 fólkum er ein høll. Umstøðurnar har mugu sigast at vera sera góðar.

Í Vágs kommunu búgva 1.332 fólk, og tey eru um høllina á Eiðinum.

Í Nes kommunu við 1.236 fólkum er ongin høll. Skal spælast í høll, má farast til Runavíkar. Í Vestmanna kommunu eru 1.214 fólk um høllina har, og í Hvalbiar kommunu hava 725 fólk Roynhøllina, sum er ein triðingur av eini vanligari høll.

Í Sands kommunu eru 527 fólk og í allari oynni 1.275 fólk. Tey hava høllina á Sandi.

Í ítróttarhallum ber til at íðka fleiri sløg av ítróttagreinum, men tá tosað verður um hallir í fullari stødd, verður mangan fyrst og fremst hugsað um hondbólt og flogbólt. Áhugavert er tí at hyggja at, hvussu nógv íðkandi eru í hesum ítróttagreinum í kommununum samanborið við hallir.

Í hondbólti eru 2.068 íðkandi og flogbólti 960. Soleiðis býta øll tey íðkandi í hondbólti og flogbólti seg kring landið:

**Íðkandi í hondbólti og flogbólti býtt á kommunur og hallir**

| Kommuna | Hondbóltur | Flogbóltur | Tilsamans | Hallir |
|---|---|---|---|---|
| Tórshavnar kommuna | 1.007 | 180 | 1.187 | 4 |
| Klaksvíkar kommuna | 210 | 130 | 340 | 2 |
| Runavíkar og Sjóvar kommunur | 80+219 | 0 | 299 | 2 |
| Eysturkommuna | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Vága kommuna | 160 | 96 | 256 | 1 |
| Tvøroyrar kommuna | 0 | 120 | 120 | 1 |
| Sunda kommuna | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Fuglafjarðar kommuna | 0 | 130 | 130 | 1 |
| Vágs kommuna | 102 | 0 | 120 | 1 |
| Nes kommuna | 0 | 60 | 60 | 0 |
| Vestmanna kommuna | 200 | 0 | 200 | 1 |
| Sørvágs kommuna | 0 | 200 | 200 | 0 |
| Eiðis kommuna | 60 | 0 | 60 | 1 |
| Sands kommuna | 30 | 44 | 74 | 1 |
| **Tilsamans** | **2.068** | **960** | **3.028** | **15** |

Viðmerkjast skal, at ikki bara flogbóltur og hondbóltur verða íðkaðir í ítróttarhallunum. Badminton verður spælt í hallunum á Giljanesi og í Klaksvík, fimleikur og badminton verða íðkað í Vestmanna, har Havnar Fimleikafelag hevur eina deild, og fimleikur og badminton eru eisini í høllini á Kambsdali.

# Frælsur ítróttur

Fjórðstørsta ítróttagreinin er frælsur ítróttur við 1.117 íðkandi. Í frælsum ítrótti eru nógvar ymsar greinir, sum krevja, at eitt stadionøki er tøkt. Í Føroyum eru bara tvey stadion við rennibreyt og øðrum hentleikum, sum hoyra stadionøkjum til. Talan er um stadionøkið á Svangaskarði frá 1989 og Tórsbreyt frá 2008.

Bæði stadionøkini eru uttandura, og vetrarhálvuna er mangan trupult at íðka á teimum, tí veðrið kann vera ótespiligt.

**Stadion í Føroyum**

| | |
|---|---|
| Svangaskarð á Toftum | 1989 |
| Tórsbreyt í Tórshavn | 2008 |

Til ber m.a. at kappast her í renning, forðarenning, boðrenning, spjótkasti, klingruvarpi, hamarkasti, kúluvarpi, longdarlopi, hæddarlopi og øðrum greinum, sum hoyra frælsum ítrótti til.

Vøksturin í frælsum ítrótti tók dik á seg, tá eitt fólkaheilsurák tók seg upp um 2005, og skipað varð fyri ymsum rennikappingum. At talið á íðkandi er vorðið 1.117, er einastandandi, tá hugsað verður um, at fyri 25 árum síðan vóru bara 40 limir í Bragdinum, sum var einasta felagið tá.

Tilsamans eru nú 590 íðkarar í frælsum ítrótti í Havn í feløgunum Bragdinum og Hvirluni. 300 eru í Treystinum í Klaksvík, 89 í Roysninum í Runavík. 59 í Frælsinum í Vágum og 79 í Hvistuni í Suðuroy.

Trongligt er longu á Tórsbreyt, har feløgini vaksa alsamt, m.a. tí almenningurin brúkar breytina morgun, dag og kvøld.

Trýstið er minni á breytina á Svangaskarði, og í Klaksvík, har ongin breyt er, blómar Treysti kortini og hevði ivaleyst vaksið uppaftur meira við eini breyt. Ætlanir eru um at gera ein rennibreyt í Klaksvík. Breyt hevði eisini kunnað verið í eitt nú Suðuroy.

Feløgini í frælsum ítrótti hava ongi felagshús. Henda ítróttagrein átti at fingið betri umstøður í framtíðini.

# Flogbóltur

Fimtstørsta ítróttagreinin er flogbóltur. Skrásettir eru 960 limir í flogbóltsfeløgunum. Flogbóltur verður íðkaður í ítróttahallum og fimleikahallum kring landið.

At síggja til skuldu umstøðurnar til flogbólt verið góðar, tá havt verður í huga, at 15 ítróttahallir, Badminonhøllin í Havn ikki íroknað, eru í landinum og haraftrat 37 smærri fimleikahallir.

Kortini er ymiskt, hvussu flogbólturin er fyri. Í Havn skal flogbólturin laga hallartíðir til annan ítrótt, serliga hondbólt. Í Sørvági, har flogbólturin er lutfalsliga stór ítróttagrein, er ongin ítróttarhøll og bara ein fimleikahøll at venja í. Í t.d. høllini í Trongisvági hevur flogbólturin góðar umstøður, tí har kappast hann ikki við hondbólt longur.

Ætlanir hava verið frammi um at útbyggja Gundadalshøllina í Havn, so bæði hondbóltur og flogbóltur kundu fáa betri umstøður, men hendan ætlanin er ikki sett í verk enn. Eisini hevur verið frammi at byggja út á Hálsi, so eitt hallargólv kundi gerast tøkt aftrat.

Á hesum plássum verður flogbóltur íðkaður:

| **Kommuna** | **Íðkandi** |
|---|---:|
| Sørvágs kommuna | 200 |
| Tórshavnar kommuna | 180 |
| Klaksvíkar kommuna | 130 |
| Fuglafjarðar kommuna | 130 |
| Tvøroyrar kommuna | 120 |
| Vága kommuna | 96 |
| Nes kommuna | 60 |
| Sands kommuna | 44 |
| **Tilsamans** | **960** |

Hvussu umstøðurnar viðvíkjandi hallum eru, sæst undir partinum um hondbólt.

# Svimjing

Svimjing er 6. størsta ítróttagreinin í Føroyum. Skrásettir eru 816 limir í svimjifeløgunum. Svimjingin er tann ítróttagreinin, sum er komin longst í heimshøpi. Umstøðurnar hjá svimjarum hava tó ongantíð verið nøktandi í Føroyum.

Í landinum eru 19 hyljar, og av teimum er bara ein, sum er 50 metrar. Hann kom í 2015 í Vági. Bara tveir hyljar eru 25 metrar, tann í Havn og tann í Klaksvík. 11 hyljar á um 16,6 metrar eru í ymsum skúlum, og so eru eisini nakrir smærri skúlahyljar.

Verður havt í huga, at hyljarnir í Havn og Klaksvík eisini eru almennir stóran part av degnum, eru umstøðurnar alt annað enn góðar. Í einum so fólkaríkum øki sum Eysturoynni er ongin 25 m hylur, og at bara ein 25 m hylur er í Tórshavnar kommunu, er heldur ikki nóg mikið. Ætlanir eru um at gera 50 m hyl í Havn í næstum.

Hóast umstøðurnar hjá svimjingini eru ónøktandi, hevur svimjingin gjørt hol í sjógvin í altjóða kappingum. Tað stóra takið framá varð tikið, tá Pál Joensen í Beograd í Serbia gjørdist trífaldur EM-vinnari fyri juniorar í 2008. Síðan hevur hann vunnið bæði EM- og HM-heiðursmerkir.

Eisini aðrir svimjarar hava gjørt nógv um seg, og á oyggjaleikunum hevur svimjingin vunnið Føroyum eitt heiðursmerki fyri og annað eftir í mong ár. Í Tórshavnar kommunu eru 300 svimjarar, í Suðuroynni 162, í Nes kommunu 130, í Fuglafirði 94 og í Klaksvík 90.

| **Svimjihyljar í Føroyum** | |
|---|---|
| Vágs svimjihøll | 50 m |
| Klaksvíkar svimjihøll | 25 m |
| Svimjihøllin í Gundadali | 25 m |
| Sandoyar meginskúli | 17 m |
| Eysturskúlin | 16,7 m |
| Sørvágs skúli | 16,7 m |
| Gøtu skúli | 16,6 m |
| Stranda skúli | 16,6 m |
| Fuglafjarðar skúli | 16,6 m |
| Kollafjarðar skúli | 16,6 m |
| Leirvíkar skúli | 16,6 m |
| Argja skúli | 16,6 m |
| Svimjihylur á Oyrarbakka | 16,6 m |
| Tofta skúli | 16,6 m |
| Svimjihylurin í Hesti | 15,5 m |
| Tvøroyrar skúli | 12,5 m |
| Kvívíkar skúli | 12 m |
| Vestmanna skúli | 10 m |
| Søldafjarðar skúli | 6 m |

# Kappróður

Hjá ÍSF eru skrásettir 656 rógvarar, og kappróður er tí 7. størsta ítróttagreinin. Rógvingin er serlig á tann hátt, at talan er um siðbundnan ítrótt í serligum føroyskum bátum.

Siðbundni kappróðurin hevur avbjóðingar á tann hátt, at í 1980'unum kundu vera 80-90 bátar við á stevnunum. Í dag eru ofta ikki fleiri enn 40 bátar við. Frá 2002 tók inniróður dik á seg, og hetta ávirkaði kappróðurin á firðunum, m.a. tí í inniróðri krevst ikki ein heil manning fyri at vera við. Tú kanst rógva sum einstaklingur.

Samstundis sum inniróður tók dik á seg, mentust venjingarumstøðurnar hjá feløgunum munandi. Flestu neystini kring landið eru í dag útgjørd við brúsum, vektum og rógvimaskinum. Fleiri hava eisini súkklur og rennibond, upplýsir Róðrarsamband Føroya.

Ymiskt er tó, hvussu nógv er til av útbúnaði í ymsum neystunum. Summi feløg hava 10 rógvimaskinur, tí tey hava 10-mannafar, onnur hava kanska bara seks, tí tey hava bara 6-mannafar. Samanumtikið eru umstøðurnar munandi betri, enn tær vóru, tá eitt neyst var eitt neyst, har tú hevði bátin standandi. Hesi eru feløgini í kappróðri.

**Róðrarfeløg í Føroyum:**
Argja Róðrarfelag
Havnar Róðrarfelag
Hósvíkar Róðrarfelag – HVR
ÍF – Kappróður
Kappróðrarfelagið NSÍ
Klaksvíkar Róðrarfelag
Kollafjarðar Ítróttarfelag – KÍF
Kvívíkar Sóknar Róðrarfelag – K.S.R.
Miðvágs Kappróðrarfelag
Norðdepils-Hvannasunds Róðrarfelag
Nólsoyar Ítróttarfelag – NÍF
Oyndarfjarðar Ítróttafelag
Róðrarfelagið Knørrur
Sandavágs Ítróttarfelag – SÍF
Skála Róðrarfelag
Strálan
Sunda Róðrarfelag – SU.R.F.
Sørvágs Róðrarfelag – SR
Vágs Kappróðrarfelag – VK
Hvalvíkar Streymnesar Róðrarfelag
Froðbiar Sóknar Róðrarfelag
Suðuroyar Kappróðrarfelag
Vestmanna Ítróttafelag – VÍF

# Badminton

Badminton er ítróttagrein í vøkstri, og hon er 8. størsta ítróttagreinin. Tvey nýggj badmintonfeløg eru stovnað í seinastuni, Sandoyar Badmintonfelag og Badmintonfelagið Nápur. Enn eru tey ikki vorðin limir í Badmintonsambandi Føroya, men tað verða tey. Spælt verður eisini í Havn, Klaksvík, Fuglafirði, Vestmanna og Miðvági.

Tilsamans eru 480 limir, harav 200 í Havn og 130 í Klaksvík. Tvær badmintonhallir eru í Føroyum, tann í Havn frá 1983, sum upprunaliga var svimjihylur, og tann í Klaksvík frá 2007.

Spælt verður eisini í ítróttahallum, m.a. á Giljanesi, Kambsdali, Sandi og í Vestmanna, og til ber at spæla badminton í fimleikahallunum.

Badminton er ítróttagrein, sum fleiri ferðir hevur gjørt um seg á oyggjaleikunum, og ítróttagreinin hevur vunnið heiðursmerkir í fleiri førum.

Nógv ljós verður varpað á badminton, tá ítróttagreinin saman við borðtennis og judo skipar fyri FM-kappingum í apríl hvørt ár.

**Badmintonhallir í Føroyum:**

| | |
|---|---|
| Badmintonhøllin í Havn | 1983 |
| Badmintonhøllin í Klaksvík | 2007 |

# Ríðing

Skrásettir undir Ríðisambandi Føroya eru 465 limir. Ríðing er líka nógv frítíðarítriv sum kappingarítrótt, og eftir limatalinum er ríðing 9. størsta ítróttagreinin. Hentleikar til ríðing eru serliga í Havn og í Vágum, har rossafeløgini eru.

**Hentleikar til ríðing:**

| | |
|---|---|
| Føroya Ríðingarfelag | Ríðihøll, felagshús og fjós |
| Føroyskt-íslendskt rossafelag | Ríðihøll, felagshús og fjós |
| Berg Hestar | Ríðihøll, fjós og skiftirúm |
| Vága Ríðingarfelag | Ríðihøll við sambygdum fjósum í gerð |

Ross hava verið í Føroyum alt tað, sum fólk vita um at siga. Avbyrgda støðan í Norðuratlantshavi gjørdi, at rossið lagaði seg eftir viðurskiftunum. Bara tey ross, sum toldu veðurlagið, yvirlivdu, og føroyingar fingu tí eitt rossaslag, sum var sterkt, harðført og fótafimt. Fyrsta ríðingarfelagið var Føroya Ríðingarfelag, sum varð stovnað í 1943. Ríðisamband Føroya varð stovnað so tíðliga sum í 1980 og er eitt av elstu sersambondunum í ÍSF.

Ríðibreyt er við Oyggjarvegin, og kappríðing hevur eisini verið og er ofta á sandinum við Leynarvatn. Riðið verður somuleiðis kapp á breyt í Vágum.

Fimm árligar FM-kappingar eru – tann fyrsta í juni í Vágum, onnur í juni við Leynarvatn, triðja í Havn á ólavsøku, fjórða í Vágum hálvan august og fimta í Havn fyrst í september.

# Seyðahundalimir

Seyðhundafelagið undir ÍSF skipar fyri at venja seyðahundar. Limirnir í felagnum eru 114 í tali og halda til í ÍSF-húsinum. Vant verður í haganum. Har eru umstøðurnar yvirhøvur nøktandi. Seyðahundafelagið er undir Deildarsambandinum fyri Nýstovnaðan Ítrótt.

# Skjóting

Í skjóting eru 104 íðkandi. Skjótingin hevur egið sersamband, og longu í 1993 vann skjótingin sítt fyrsta heiðursmerki á oyggjaleikum. Síðan hevur skjótingin vunnið fleiri heiðusmerkir á leikunum. Skjótisamband Føroya varð stovnað í 1997.

Skjótibreyt er á Sandvíkum við Hvítanes. Ein er eisini í Sundalagnum og ein í Vestmanna. Umstøðurnar kundu verið betri og hava tørv á at verða dagførdar, og hølir at vera í krevjast eisini.

**Skjótibreytir:**
1. Á Sandvíkum
2. Vestmanna
3. Sundalagið

# Súkkling/triathlon

Í súkkling og triathlon eru 93 limir, og allir eru í Havn. Súkklingin hevur fleiri ferðir gjørt vart við seg á oyggjaleikum við góðum úrslitum, og í triathlon vunnu Føroyar t.d. silvur á Bermuda í 2013.

Ein bági viðvíkjandi triathlon í Føroyum er, at sjógvurin kring oyggjarnar er so kaldur, at ítróttagreinin ikki kann íðkast her í sambandi við altjóða kappingar, eisini oyggjaleikirnar. Men FM-kappingar verða hildnar eins og aðrastaðni.

Súkklað verður úti, tí ongin høll at súkkla í er í Føroyum.

# Bogaskjóting

Bogaskjóting hevur 84 limir í Vágum, Runavík og Havn, og Bogaskjótisamband Føroya er sjálvstøðugt sersamband.

Bogaskjóting kom fyrstu ferð undan kavi í Føroyum á skipaðan hátt í sambandi við oyggjaleikirnar í 1989.

Bogaskjúttar hava vunnið hópin av heiðursmerkjum á oyggjaleikum síðan, men ongin bogaskjótibreyt er í Føroyum. Hetta er ein stórur bági fyri ítróttagreinina. Ynskið er at fáa eina bogaskjótibreyt, har skjótast kann í allar ættir, so veður ikki er ein forðing fyri venjingum og kappingum. At fáa hølir at vera í er eisini ein treyt fyri betri trivnaði og menning. Í Vágum hevur felagið Vágaskot egin hølir.

Samanborið við, hvussu framsøkin bogaskjótingin hevur verið á altjóða pallinum, eru umstøðurnar hjá ítróttagreinini út av lagi vánaligar.

Bogaskjúttar fingu altjóða viðurkenning í 1997 í Victoria í British Columbia í Kanada. Sama ár gingu bogaskjúttar saman við byrsuskjúttum í Skjótisambandi Føroya, men í 2011 gjørdist Bogaskjótisamband Føroya sjálvstøðugt sersamband.

# Golf

Í golf eru 82 íðkandi, sum bara eru í Havn, og spælt verður á Glyvursnesi, har ein vøllur við 9 holum er. Talan er kortini ikki um ein golfvøll, sum lýkur krøv til altjóða kappingar.

Í sambandi við royndirnar at fáa oyggjaleikirnar aftur til Føroya hava ÍSF, Tórshavnar kommuna og landið leingi samráðst um, hvussu altjóða golfvøllur kann verða gjørdur á Glyvursnesi. M.a. krevst at fáa til vega lendið at gera vøllin á. Hetta er ikki avgreitt enn, og tí eru útlitini fyri einum altjóða golfvølli óviss. Ongin ivi er tó um, at ein nýggjur vøllur kundi skundað undir, at ítróttagreinin hevði vaksið.

Golf hevur fleiri ferðir verið við á oyggjaleikum. Hugsast kann, at um ein veruligur golfvøllur verður gjørdur á Glyvursnesi, kann hann eisini koma ferðavinnuni til góðar.

# Borðtennis

Ongi hølir eru serstakt til borðtennis í landinum. Har borðtennis verður vant, skulu borðini dragast út á gólv og takast niðuraftur hvørja ferð, og ítróttagreinin hevur flutt nógv millum hølir, ikki minst í Tórshavnar kommunu.

Borðtennis hevur í løtuni bara 68 íðkandi kring landið, men tey kundu verið nógv fleiri, um ítróttagreinin hevði betri hølisumstøður. Saman við badminton og judo skipar ítróttagreinin hvørt ár fyri felags finaludegi, sum verður vístur í sjónvarpinum. Hetta varpar ljós á ítróttagreinina.

Havandi í huga, at borðtennis er heilt gomul ítróttagrein í Føroyum, og at Borðtennissamband Føroya var næsta sersambandið, ið fekk altjóða viðurkenning, eru umstøðurnar alt annað enn góðar. Átrokandi neyðugt er at bøta um umstøðurnar hjá borðtennis, skal ítróttagreinin ikki detta heilt niðurfyri.

# Judo

Judo er ítróttagrein, sum søguliga hevur verið í størri menning, enn hon er nú, og á oyggjaleikum hevur judo vunnið mong heiðursmerkir. Judosamband Føroya hevur eisini altjóða viðurkenning.

Í ítróttagreinini eru nú 66 limir.

Umstøðurnar eru alt annað enn góðar, tí í landinum er ongin judohøll, og har íðkararnir venja, skulu máttturnar dragast út á gólv og leggjast upp á pláss aftur, hvørja ferð liðugt er at venja.

Eins og viðvíkjandi borðtennis kundi ítróttagreinin vaksið, um hølisumstøðurnar gjørdust betri. Ljós verður varpað á judo í sambandi við árliga finaludagin hjá badminton, borðtennis og judo. Bøtast umstøðurnar ikki skjótt, kann ítróttagreinin skjótt fána burtur.

# Tennis

Tennis kundi verið ítróttagrein, sum var munandi størri, enn hon er. Í løtuni eru bara 60 íðkandi, og einastu tennisvøllirnir eru dupultvøllurin í Gundadali og ein á Svangaskarði. Vøllirnir eru úti, og tí er sera misjavnt, hvussu eydnast at spæla har, tí veðrið er so skiftandi.

Skipað hevur verið fyri FM-kappingum í tennis, sum eru avgreiddar í Havn, og tennis hevur verið við á oyggjaleikum, men vøkstur er ikki í ítróttagreinini, tí ongin høll er til tennis.

# Froskmenn

Froskmenn halda til í svimjihøllini í Gundadali og á sjónum. Her eru 45 limir. Virksemið er skiftandi, og eins og hjá øllum ítróttagreinum eru hølir ein átrokandi spurningur. Froskmenninir eru skrásettir undir Deildarsambandinum fyri Nýstovnaðan Ítrótt.

# Biljard

Tilsamans 39 fólk spæla biljard. Hesir limirnir eru skrásettir undir Deildarsambandinum fyri Nýstovnaðan Ítrótt. Biljard varð fyrr spælt í ølklubbum, og framvegis verður siðvenjan hildin í hevd fleiri staðni kring landið. Skipað verður enn fyri FM-kappingum.

# Kurvabóltur

Bara eitt felag er í kurvabólti í Føroyum. Tað venur í Hoydølum, og kurvabóltur verður við á oyggjaleikunum á Jersey 2015. Um 25 íðkandi eru í kurvabólti.

Ongin siðvenja er at spæla skipaðan kurvabólt í Føroyum, tó at skúlaungdómur stundum roynir seg í kurvabólti í fimleikahallum kring landið.

Í Gundadalshøllini hanga kurvar uppi til kurvabólt tvørtur um hondbóltsvøllin, men feløgini, sum eiga høllina, spæla fyrst og fremst hondbólt og flogbólt.

# ÍSF má hava nýtt høvuðssæti

Er støðan ikki nøktandi, hvat ítróttaanleggum viðvíkur, so er hon als ikki nøktandi, tá tað snýr seg um hølisumstøðurnar hjá ÍSF.

Húsið í Gundadali var upprunaliga gamla felagshúsið hjá Neistanum. Tað varð bygt í 1964, og ÍSF flutti inn í tað 25. juli í 1975. Í 1982 varð húsið høvuðsumvælt og útbygt. Liðin eru sostatt 33 ár, síðan veruligar ábøtur vórðu gjørdar á hølisumstøðurnar hjá ÍSF.

Ein og hvør, sum hevur sína gongd í ÍSF-húsinum, sær, at húsið er ov lítið. Summi sersambond hava eina lítla skrivstovu at húsast í, men fleiri hava onga, og salurin á ovastu hædd er so trongur, at tá 30-40 fólk eru inni, er fullsett og ógvuliga heitt.

Samanbera vit hølisumstøðurnar hjá ÍSF við umstøðurnar á Tórsvølli hjá størsta sersambandinum, Fótbóltssambandi Føroya, sæst beinanvegin, at ÍSF er vorðið eftirbátur.

Eitt høvuðssæti vísir, hvørja ambitión tey hava, sum húsast í tí. Føroyskur ítróttur hevur stórar altjóða ambitiónir, og ÍSF má tí fáa eitt sæti, sum endurspeglar hendan veruleika. Nýggja høvuðssætið hjá ÍSF skal gerast sendistovan hjá føroyskum ítrótti og miðdepilin í allari ítróttaligari menning næstu árini.

Verða ongi stig tikin til at byggja nýtt sæti, fer orkan at verða nýtt til at pjøssa upp á og viðlíkahalda verandi bygning, og tað verður ikki nøktandi.

Havast skal í huga, at ÍSF-høvuðssætið er bygningurin, sum eisini útlendskir gestir og fjølmiðlar verða bodnir inní, tá teir vitja. Í verandi húsi er ikki so frægt sum ein skrivstova tøk at bjóða gestum og fjølmiðlum at brúka. Haraftrat er heldur ongin lyfta til fólk, ið bera brek. Fólk mugu tí lyftast upp ígjøgnum trappurnar, tá fundur er í salinum á loftinum.

ÍSF heitir á landsmyndugleikarnar um at seta pening av til at byggja nýtt høvuðssæti, sum kann gerast karmur um eina líka stóra menning í føroyskum ítrótti næstu næstu 25 árini sum farnu 25 árini.

Fótbóltssamband Føroya hevur framt sína útbygging á Tórsvølli í samstarvi við Tórshavnar kommunu og UEFA, og uttan iva eru møguleikar fyri, at fleiri partar kunnu samstarva um at byggja nýtt ÍSF-høvuðssæti.

# Samanumtøka

Eins og nevnt verður í innganginum, er ætlanin við hesi frágreiðing at vísa á tørvin viðvíkjandi ítróttaanleggum í Føroyum samanborið við fólkatal og tal á íðkandi í ymsu ítróttagreinunum.

Sum frágreiðingin vísir, er tørvurin stórur í fleiri førum. Í sambandi við fótbólt er trýstið størst á vøllirnar í Klaksvík og Tórshavnar býi.

Í fimleiki eru nýggjar hallir á altjóða stigi komnar í Tórshavnar kommunu og Runavíkar kommunu, og hetta eru einastu fult útgjørdu fimleikahallirnar. Ongin er t.d. í Klaksvík ella í Suðuroy.

Hondbóltur hevur eisini misjavnar umstøður. Fleiri staðni eru lutfalsliga fá íðkandi til hvørja høll, men í Tórshavnar býi er stórur tørvur á minst eini høll aftrat, tí trongt er í verandi hallum.

Stadionøkir við rennibreyt til frælsan ítrótt eru bara í Havn og á Svangaskarði, og stadionøkir kundu væl verið í t.d. Klaksvík og Suðuroy eisini.

Í flogbólti eru umstøðurnar alt annað enn góðar í Sørvági, har 200 limir íðka í eini fimleikahøll. Trongligt er eisini hjá flogbóltinum í Havn, har hann kappast við hondbóltin um pláss.

Viðvíkjandi svimjing stendur illa til í Eysturoy, har ongin 25 m hylur er. Trýstið er eisini stórt á 25 m hyljarnar í Klaksvík og Havn, har almenningurin brúkar hyljarnar hvønn dag.

Misjavnt er, hvussu hølisumstøðurnar hjá kappróðrinum eru. Summi feløg eru væl fyri, meðan onnur hava stóran tørv á dagførdum umstøðum. Kappróður er tjóðarítrótt Føroya, og fleiri neyst áttu at verið mitt í bygdum øki, har ferðafólk koma.

Tvær hallir eru til badminton, og badminton verður eisini spælt í øðrum hallum. Ítróttagreinin kundi havt betri umstøður. T.d. vanta hallartímar í Havn.

Ríðingin fær støðugt betri umstøður, nú skjótt eisini í Vágum, men hentleikar eru bara til vanliga kappríðing og ikki til serlig sløg av ríðikappingum.

Skjóting kundi havt betri umstøður, tí skjótibreytir kunnu vera aðrastaðni enn í Sandvíkum, Sundalagnum og Vestmanna. Men støðan er batnað samanborið við, tá breyt bara var í Havn. Hesar tríggjar breytirnar lúka tó ikki treytirnar til altjóða kappingar.

Umstøðurnar hjá bogaskjóting eru út av lagi vánaligar, tí ongin bogaskjótibreyt er í landinum. Hetta er ein andsøgn, tá havt verður í huga, hvussu væl bogaskjúttar hava staðið seg mangan.

Ein altjóða vøllur til golf vantar í Føroyum, og ongin ivi er um, at hevði ein tílíkur vøllur verið, hevði ítróttagreinin vaksið skjótt.

Ongin høll til borðtennis er bygd, og hon má koma, skal ítróttagreinin vaksa. Borðtennis var næsta ítróttagreinin, ið fekk altjoða viðurkenning, men er í ólukkumát eftirbátur.

Judo er somuleiðis ítróttagrein, sum er eftirbátur, tí ongin judohøll er í Føroyum. Tað er eitt knoss at halda lív í ítróttagreinini, og ábøtur krevjast skjótt.

Tennis veksur ikki sum ítróttagrein, tí ongin høll er til ítróttagreinina. Alt ov svikaligt er at spæla tennis úti, tí tú veitst aldrin, hvussu veðrið er, og mangan er tað ringt.

Haraftrat er neyðugt, at ÍSF fær nýtt høvuðssæti.

# FÓLKATALIÐ Í FØROYUM 2015

| **Allar Føroyar** | **48.704** |
|---|---|

| **Fugloyar kommuna** | **40** |
|---|---|
| Hattarvík | 14 |
| Kirkja | 26 |

| **Viðareiðis kommuna** | **348** |
|---|---|
| Viðareiði | 348 |

| **Hvannasunds kommuna** | **396** |
|---|---|
| Depil | 2 |
| Hvannasund | 228 |
| Múli | 0 |
| Norðdepil | 163 |
| Norðtoftir | 3 |

| **Klaksvíkar kommuna** | **4893** |
|---|---|
| Svínoy | 27 |
| Klaksvík | 4607 |
| Árnafjørður | 54 |
| Norðoyri | 104 |
| Ánirnar | 57 |
| Mikladalur | 29 |
| Trøllanes | 15 |

| **Kunoyar kommuna** | **129** |
|---|---|
| Haraldssund | 64 |
| Kunoy | 65 |

| **Húsar kommuna** | **49** |
|---|---|
| Húsar | 43 |
| Syðradalur, Kalsoy | 6 |

| **Fuglafjarðar kommuna** | **1521** |
|---|---|
| Fuglafjørður | 1507 |
| Hellurnar | 14 |

| **Eysturkommuna** | **2001** |
|---|---|
| Leirvík | 896 |
| Undir Gøtueiði | 28 |
| Gøtugjógv | 39 |
| Í Skálafirði | 0 |
| Norðragøta | 629 |
| Syðrugøta | 409 |

| **Nes kommuna** | **1236** |
|---|---|
| Oyndarfjørður | 133 |
| Elduvík | 17 |
| Funningsfjørður | 52 |
| Funningur | 51 |
| Æðuvík | 104 |
| Glyvrar | 371 |
| Lamba | 140 |
| Rituvík | 260 |
| Runavík | 525 |
| Saltangará | 977 |
| Skipanes | 60 |
| Søldarfjørður | 322 |
| Lambareiði | 3 |
| Skála | 672 |
| Skálabotnur | 106 |

| **Sjóvar kommuna** | **938** |
|---|---|
| Innan Glyvur | 77 |
| Kolbeinagjógv | 25 |
| Morskranes | 30 |
| Selatrað | 40 |
| Strendur | 766 |

| **Eiðis kommuna** | **687** |
|---|---|
| Eiði | 631 |
| Ljósá | 21 |
| Svínáir | 35 |

| **Sunda kommuna** | **1646** |
|---|---|
| Norðskáli | 298 |
| Oyrarbakki | 145 |
| Oyri | 139 |
| Gjógv | 28 |
| Haldórsvík | 124 |
| Langasandur | 41 |
| Tjørnuvík | 56 |
| Saksun | 10 |
| Hvalvík | 231 |
| Nesvík | 1 |
| Streymnes | 263 |
| Hósvík | 310 |

| **Kvívíkar kommuna** | **570** |
|---|---|
| Kvívík | 362 |
| Leynar | 102 |
| Skælingur | 16 |
| Stykkið | 41 |
| Válur | 49 |

| **Vestmanna kommuna** | **1214** |
|---|---|
| Vestmanna | 1214 |

| **Tórshavnar kommuna** | **20235** |
|---|---|
| Tórshavn | 12640 |
| Kollafjørður | 750 |
| Oyrareingir | 41 |
| Signabøur | 134 |
| Kaldbak | 228 |
| Kaldbaksbotnur | 9 |
| Mjørkadalur | 0 |
| Sund | 2 |
| Hvítanes | 95 |
| Hoyvík | 3800 |
| Argir | 1984 |
| Norðradalur | 14 |
| Syðradalur, Streymoy | 7 |
| Kirkjubøur | 74 |
| Velbastaður | 220 |
| Hestur | 18 |
| Koltur | 1 |
| Nólsoy | 218 |

| **Vága kommuna** | **1991** |
|---|---|
| Sandavágur | 881 |
| Miðvágur | 1059 |
| Vatnsoyrar | 51 |

| **Sørvágs kommuna** | **1090** |
|---|---|
| Sørvágur | 991 |
| Bøur | 69 |
| Gásadalur | 17 |
| Mykines | 13 |

| **Sands kommuna** | **527** |
|---|---|
| Sandur | 527 |

| **Skopunar kommuna** | **448** |
|---|---|
| Skopun | 448 |

| **Skálavíkar kommuna** | **140** |
|---|---|
| Skálavík | 140 |

| **Húsavíkar kommuna** | **117** |
|---|---|
| Dalur | 34 |
| Húsavík | 70 |
| Skarvanes | 13 |

| **Skúvoyar kommuna** | **43** |
|---|---|
| Skúgvoy | 33 |
| Stóra Dímun | 10 |

| **Hvalbiar kommuna** | **725** |
|---|---|
| Hvalba | 638 |
| Sandvík | 87 |

| **Tvøroyrar kommuna** | **1730** |
|---|---|
| Froðba | 288 |
| Trongisvágur | 517 |
| Tvøroyri | 823 |
| Ørðavík | 33 |
| Ørðavíkarlíð | 69 |

| **Fámjins kommuna** | **92** |
|---|---|
| Fámjin | 92 |

| **Hovs kommuna** | **117** |
|---|---|
| Hov | 117 |

| **Porkeris kommuna** | **302** |
|---|---|
| Porkeri | 302 |

| **Vágs kommuna** | **1332** |
|---|---|
| Vágur | 1332 |

| **Sumbiar kommuna** | **354** |
|---|---|
| Lopra | 87 |
| Sumba | 248 |
| Víkarbyrgi | 0 |
| Akrar | 19 |